# Ljósið á Hálsi

**Sunnudagin hevði Ljósið ta árligu fimleika-framsýningina í høllini á Hálsi**

FIMLEIKUR
*Stefan í Skorini*

Øll fimleikafeløgini í landinum hava seinastu tíðina havt innanhýsis framsýningar, har allir íðkandi limirnir sleppa at royna seg og vísa, hvat teir hava arbeitt við gjøgnum veturin. Tær, sum hava verið higartil, hava verið ógvuliga væl vitjaðar, og framsýningin sunnudagin var einki undantak.

Sunnudagin var tað nevniliga Fimleikafelagið Ljósið í Havn, sum hevði framsýning í høllini á Hálsi.

Har sluppu allir aldursbólkar at royna seg við eini framsýning. Tey yngstu undir skúlaaldur og móður og barn liðið vóru eisini á gólvinum.

Høllin var stúgvandi full, so stórur áhugi var fyri framsýningini, hóast hon ikki var skipað sum ein kapping.











*Fimleikafelagið Ljósið hevði sunnudagin eina innanhýsis fimleika-framsýning í høllini á Hálsi. Nógv fólk var komið í høllina at hyggja*
*Myndir: Álvur Haraldsen*



## Gøtu Kommuna

# Kunngerð

## um framløgu av broytingaruppskotum í býarskipan og byggisamtykt fyri Gøtu kommunu

Við heimild í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 við seinri broytingum hevur bygdaráðið á fundi samtykt at gera uppskot til broytingar í býarskipan og byggisamtykt fyri Gøtu kommunu.

Broytingarnar eru:

1) **Byggisamtyktin og býarskipanin fyri Gøtu kommunu verður framlongd at galda til 1. januar 2006, tó verða gjørdar hesar broytingar:**

2) **Nýtt økið E litað gult = almennar stovnar: sunnanfyri núverandi útstykkingar í Norðagøtu verður lagt út, ætlað til sambýlið, eldraíbúðir o.tl.**

3) **Nýtt økið B, litað orange = sethúsøkið: sunnanfyri hjá Jógvan Joensen, í Frammistovu.**

4) **Økið F = Alm. Frítíðarøki verður flutt – tillagað 2) og 3).**

5) **Økið G omanfyri vegin við Gøtu Fiskavirkið verður broytt til D – økið, litað blátt = havnaøkið –** ætlað til P. økið.

6) **Neystini frá gomlu kirkjuni og út eftir kajuni verður litað grátt, merkt G – økið = til neyst. Økið niðanfyri neystini á kajuni verður litað blátt og merkt D–økið.**

Broytingarnar, ið eru lýstar við litaðum kortum, hanga uppi í gongini á kommunuskrivstovuni til almenna eftirskoðan í vanligu upplatingartíðunum frá 21. mars til og við 18. apríl 2002. Møgulig mótmæli og/ ella broytingaruppskot skulu skrivliga verða kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 21. juni 2002.

**Gøtu Kommuna**

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3332
Navn: Sp/f EHS-BETONG
Adressa: 900 Vágur
Kommuna: Vágs Kommuna
Stovningardato: 13.03.2002
Viðtøkudato: 13.03.2002
Kapitalur: Kr. 100.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 100.000,00 til kurs 100.
Stovnarar: Heri Silvurdal, 900 Vágur og Eyðun Holm Joensen, 900 Vágur.
Stjórn: Heri Silvurdal, 900 Vágur og Eyðun Holm Joensen, 900 Vágur.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjórnini.
Grannskoðari: : P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 13.03.2002 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka blandistøð og betongarbeiði og annað í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 15. mars 2002

Kristin Balle












## Ellis- & avlamisheimið í Vágum

# Frítíðaravloysarir

Søkt verður eftir sjúkrasystrum, sjúkrahjálparum/-heilsuatstøðingum og heilsuhjálparum, húsavørði, ítrivs- og fysioterapeuti og ymsum hjálparfólkum.

Skrivlig umsókn verður at senda til heimið áðrenn 15. apríl 2002.

# Skrivari

Søkt verður eftir skrivara til Leirvíkar kommunu at byrja skjótast tilber.

**Arbeiðsuppgávur:**

- skrivari hjá bygdarráðnum og nevndum
- journalisering
- fólkayvirlit
- fíggjarviðurskiftir
- aðrar skrivstovuuppgávur

Bygdarráðið er í ferð við at gera eina starvsfólkaskipan fyri Leirvíkar kommunu og í tí sambandi kunnu broytingar verða í arbeiðsuppgávunum.

**Førleiki:**
Útbúgving og/ella royndir innan almenna umsiting og roknskap er ein treyt, eins og kunnleiki til nýtslu av teldu.

**Løn:**
Løn sambært avtalu við avvarðandi yrkisfelag.

**Upplýsingar og umsókn:**
Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til kommunuskrivstovuna tlf. 443006 ella Sjúrð Eliasen, borgarstjóra, tlf. 213006.

Umsókn við avritum av møguligum prógvum og ummælum skal verða kommununi í hendi í seinasta lagi **fríggjadagin 5. apríl 2002 kl. 12.**

Bygdarráðið skilar sær rætt til frítt at velja millum umsøkjararnar ella ongan at taka.

**Leirvíkar Kommuna**
Postboks 42
520 Leirvík

# Tannlæknahjálparfólk

Søkt verður eftir avloysara fyri tannlæknahjálparfólk í farloyvi í 6 mánaðir, at arbeiða 1/2 tíð (fyrrapart) á Tannlæknastovuni á Skála, frá 15. apríl 2002 at rokna.

Lønin er samb. sáttmála millum Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag og Starvsmannafelagið.

Skrivlig umsókn skal vera kommunuskrivstovuni í hendi seinast mikudagin 3. apríl 2002.

**Skála Kommuna**
480 Skála

**Virkir, sum ætla at seta lærlingar, skulu hava læruplássgóðkenning.**

***Tí eiga virkir at søkja um læruplássgóðkenning í góðari tíð frammanundan***

Yrkisdepilin

**Yrkisdepilin**
Telefon 355050
t-postur: depilin@yrkisdepilin.fo
Heimasíða: www.yrkisdepilin.fo

# Í BÝIN

HVØNN HÓSDAG